Løgmansskrivstovan

Dagfesting: 12. desember 2025
Mál nr.: 25/29119
Málsviðgjørt: SR

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
§ 13, stk. 2. Landsstýrið ásetur í kunngerð, nær §§ 3, 4, 4 a, 4 b og 5 og § 8, stk. 2 fara úr gildi. Greinarnar hava tó framvegis gildi fyri landsstýrismenn, sum sita, ella hava sitið áðrenn úrgildissetanardagin og hjúnafelaga ella børn teirra. Eftirlønaraldurin hjá landsstýrismanninum hækkar tó ikki eftir nevnda dag.	**§ 1** Í løgtingslóg nr. 10 frá 8. januar 1993 um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m., sum broytt við løgtingslóg nr. 84. frá 15. mai 2001, løgtingslóg nr. 170 frá 21. desember 2001, løgtingslóg nr. 65 frá 18. mai 2006, løgtingslóg nr. 71 frá 19. mai 2014 verður í § 13, stk. 2 aftan á 3. pkt. sum nýtt pkt. sett: "Tó verður 67 ára pensjónsaldurin hjá landsstýrismonnum, broyttur til vanliga fólkapensjónsaldurin í løgtingslóg um almannapensjónir."
	§ 2 Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.